

# Heimsins største: Statoil seta upp 400 vindmyllur í Bretlandi

Deil:

**Jan Müller**

18.02.2015 - 09:25

Oljan.fo

Myndugleikarnir í Stórabretlandi hava samtykt, at loyvi skal gevast Statoil og øðrum fyritøku at seta upp eina nýggja vindmylnulund út fyri eysturstrondina uppá 400 vindmyllur. Hesar skulu geva 2400 MW og streym til 2 mió. húsarhald skrivar Energy Watch í morgun.

Verkætlanin fevnir um tvær vindmylnulundir, Dogger Bank Creyke Beck A og B. Teir, ið standa aftanfyri ætlanina eru m.a. tvey norsk feløg, Statoil og Statkraft og síðani SSE og RWE. Felagið, sum eigur verkætlanina, eitur Forewind. Enn er ikki avgjørt, hvør skal lata myllurnar, men roknað verður við, at lundirnar fara at geva arbeiði til 900 fólk í Yorkshire og Humberside. Statoil hevur áður sett upp stórt tal av havvindmyllum í Bretlandi.

Hetta verður heimsins størsta vindmylnulund til havs.